# UNG Í FØROYUM 2008

MENTAN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Finnur Justinussen*

**Um vikuskiftið varð skipað fyri Ung í Føroyum 2008. 60 ung fólk úr øllum landinum arbeiddu við listarligu gávum sínum í seks ymsum verksmiðjum. Rakel Helmsdal er ein av trimum projektleiðarum. Spurd, hvussu hon heldur at tiltakið hepnaðist hesaferð, sigur hon við Sosialin, at alt eydnaðist til fulnar.**
**- Tað besta av øllum var, at alt bara klappaði. Har vóru absolutt ongir trupulleikar, og øll tey ungu arbeiddu sera væl í øllum verksmiðjunum, sigur hon. Endabresturin var sunnudagin seinnapart, tá úrslitini varð sýnt fram fyri almenninginum.**
**- Hetta var ein sera fín framførsla. Eisini tí at tú ongantíð veitst hvat fer at henda, tí nógv verður improviserað meðan framført verður, sigur Rakel Helmsdag, sum heldur, at øll tóktust at vera sera væl nøgd alt vikuskiftið og arbeiddu væl saman.**



*Sjónleikabólkurin framførir Huldufólkakór við støði í einum sangi frá Soud of Music*



